MENTAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
100 Tórshavn

Dagfesting: **24. september 2017**
Tygara ref.**:**
Máltal.**: 16/01186-3**

**Løgtingsmál nr. Xx/2017: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkaskúlan.**
(Skipan av landsroyndum).

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkaskúlan**
(Skipan av landsroyndum)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan, sum broytt við løgtingslóg nr. 46 frá 10. mai 1999, løgtingslóg nr. 128 frá 22. desember 2000, løgtingslóg nr. 53 frá 9. mai 2005, løgtingslóg nr. 64 frá 7. juni 2007, løgtingslóg nr. 34 frá 28 apríl 2009 og løgtingslóg nr. 67 frá 26. mai 2011, verður gjørd henda broyting:

Í § 14, stk. 5 verður eftir seinasta pkt. sett: "Landsstýrismanninum verður í serligum førum heimilað at gera frávik frá ásetingini um at skipa fyri landsroynd."

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2018.

**Kapittul 1. Almennar viðmerkingar**
**1.1 Orsøkir til uppskotið**
Sambært § 14, stk. 5, skipar landsstýrismaðurin á hvørjum ári fyri landsroynd í føroyskum, støddfrøði og náttúru og tøkni í 4. og 6. flokki í fólkaskúlanum.

Ávísar avbjóðingar hava verið við skipanini við landsroyndum, tí verður mælt til, at landsstýrismaðurin í ávísum førum kann víkja frá kravinum um at fyriskipa landsroyndir. Eftir fleiri óhepnar hendingar er tørvur á at eftirmeta og møguliga at endurskoða skipanina tøkniliga og námsfrøðiliga, herundir at orða hvat, hví og hvussu vit frameftir fyriskipa og gagnnýta eftirmetingar fólkaskúlans.

**Hoyring**

Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
☏ +298 30 65 00 • ✉ mmr@mmr.fo • www.mmr.fo

Uppskotið er sent til hoyringar hjá:
Føroya Lærarafelag, Skúlaleiðarafelagnum, Heim og Skúla, Kommunufelagnum, Fólkaskúlaráðnum.

**1.2.2 Kapittul 2. Avleiðingar av uppskotinum:**

**1.2.2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Broytingin hevur ikki fíggjarligar avleiðingar fyri kommunurnar. Um so verður, at landsroynd ikki verður hildin í einum ári, sparir landskassin útreiðslurnar til hesa.

**1.2.2.2 Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunu**
Broytingin hevur við sær, at umsitingin hjá landinum verður minni.

**1.2.2.3 Avleiðingar fyri vinnuna**
Lógaruppskotið hevur ongar fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna. Tó kann lógaruppskotið hava ávísar fíggjarligar fylgir fyri vinnuna í sambandi við landsroyndir og uppgávugerð osfr.

**1.2.2.4 Avleiðingar fyri umhvørvið**
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

**1.2.2.5 Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum:**
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**1.2.2.6 Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

**1.2.2.7 Millumtjóða sáttmálar á økinum**
Eingir millumtjóðasáttmálar eru á økinum. Lógaruppskotið hevur tí ongar avleiðingar í so máta.

**1.2.2.8 Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Eingir tvørgangandi millumtjóðasáttmálar eru á økinum. Lógaruppskotið hevur tí ongar avleiðingar í so máta.

**1.2.2.9 Marknaðarforðingar:**
Mett verður ikki, at lógaruppskotið elvir til marknaforðingar.

**1.2.2.10 Revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, útpanting, sektir ella ger onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

**1.2.2.11 Skattir og avgjøld**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um skattir og avgjøld.

**1.2.2.12 Gjøld**
Lógaruppskotið áleggur eingi gjøld.

**1.2.2.13 Áleggur lógaruppskotið fólki skyldur?**
Lógaruppskotið leggur ikki skyldur á fólk.

**1.2.2.14 Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landstýrismannin ella til kommunur?**
Lógaruppskotið gevur landsstýrismanninum heimild at gera av, um landsroynd skal verða skipað. Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til annan landsstýrismann ella til kommunurnar.

**1.2.2.15 Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum ella kommunalum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**1.2.2.16 Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar**
Lógaruppskotið hevur ongar aðrar avleiðingar enn tær nevndu.

**1.2.2.17 Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum**

| | Fyri landið/lands-myndugleikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss/ øki í landinum | Fyri ávísar bólkar | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar/ búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |

**Kapittul 3. Serligar viðmerkingar:**
**Til § 1**
Sambært § 14, stk. 5, skipar landsstýrismaðurin fyri landsroynd í føroyskum, støddfrøði og náttúru og tøkni í 4. og 6. flokki í fólkaskúlanum.

Skotið verður upp at broyta skipanina soleiðis, at landstýrismanninum í serligum førum verður heimilað at gera frávik frá ásetingini um at skipa fyri landsroynd.

**Til § 2**
Skotið verður upp, at løgtingslógin kemur í gildi 1. januar 2018.

MENTAMÁLARÁÐIÐ

Mentamálaráðið,  xx. september 2017

**Rigmor Dam**
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen

**Fylgiskjal:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur

Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
☏ +298 30 65 00 • mmr@mmr.fo • www.mmr.fo